# Krevja kinesiskan bil upphøgdan

**Nú er ein dómur feldur í Týsklandi í sambandi við at kinesiskar bilverksmiðjur kopiera týsk bilmodell. Allir Shuanghuan CEO í Týsklandi skulu upphøggast. Týski innflytarin av Shuanghuan fer at kæra dómin**




Kinesiski CEO SUV frá kinesisku verksmiðjuni Shuanghuan Automobile er eitt kopi av BMW X5

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er nakað síðan at stóru týsku bilaframleiðararnir BMW og Mercedes-Benz ákærdu kinesiska bilaídnaðin fyri at kopiera sínar bilar. Teir líkast so nógv, at fólk næstan ikki kenna mun á teimum, sum kinesararnir t.d. hava gjørt við BMW X5 og tann lítla Smart.

Á vitjan í Kina í fjør gjørdi týski samveldiskanslarin Angela Merkel eisini vart við trupulleikan.

Nú hevur so landsrætturin í München felt ein dóm um at kinesiski bilurin Shuanghuan CEO ikki skal seljast í Týsklandi meira, tí designið líkist so nógv BMW X5 at upphavsrætturin hjá BMW er brotin. Bilurin má roknast sum eitt kopi av BMW X5.

Sambært tíðindastovuni DPA er tað álagt týska innflytaranum at upphøgga allar Shuanghuan CEO, sum eru í Týskland, umframt at BMW kann krevja endurgjaldskrav frá týska innflytaranum.

Týski innflytarin, Karl Schlössl, hevur boðað frá, at hann fer at kæra dómin. Um neyðugt fer hann heilt til ES-domstólin við málinum. Meira enn 1000 bilar av sama slagi eru seldir í Italia, og eitt bilmodell, sum eisini verður selt aðrastaðni í Evropa, kunnu týskarar ikki bara gera enda á, sigur týski innflytarin.



*BMW X5 sum kinesarar hava kopierað*




## Nissan Navara til sølu

Nissan Navara SE 2,5 dCi Double Cab (171 hk) 5-persóna bilur við last (skrásettur sum persónbilur). 17 mánaðar gamal. Skrásettur fyrstu ferð 30. januar 2007. Koyrt 25.900 km.

Bilurin er væl hildin og sera væl útgjørdur og hevur t.d. differentialesperru, krók aftan, krom el-síðuspegl, gáttir og er væl rustviðgjørdur.

Nýprísur kr. 442.000,-

Til sølu fyri kr. 300.000,-

**Tel. 510036**


# Opel Eye lesur vegskeltini




Opel eru nú til reiðar við eini nýggjari skipan, sum skal hjálpa bilførarunum at halda ferðmarkið.

Opel Eye, sum skipanin eitur, avlesir og kennir øll vegskeltini. Ert.d. ferðmarkið 80 km/t, lýsir eitt tilsvarandi skelti í instrumentborðinum í bilinum. Opel Eye ávarar eisini bilføraran, um bilurin er við at fara út av koyribreytini.

Í fyrstu atløgu verður Opel Eye skipanin bert at fáa sum eykaútgerð í nýggja Insignia, sum avloysir Opel Vectra seinni í ár, men við tíðini verður skipanin eisini at fáa sum eykaútgerð til aðrar Opel bilar.

mg.